# Trond heldur tað var á góðari leið

**Fyrrverandi álopsmaðurin á FM liðnum hjá TB er nú liðleiðari, og hann heldur avrikið í Runavík at vera á góðari leið**

TB
*Jóannes Hansen*

Trond Nolsøe var saman við tvíburðabeiggjanum Ásmundi eitt av kendu nøvnunum á góða TB liðnum, sum miðskeiðis í sjeyti árunum vann tvey FM og fram í áttati árini var við til at seta dám á kappingina.

Í Runavík var Trond Nolsøe liðleiðari, og hóast TB í evstu løtu misti tvey stig, so heldur hann, at teir á Tvøroyri kunnu vera nøgdir:

- Vit vórðu kroystir í 2. hálvleikli, og hóast NSÍ ikki megnaði at spæla seg til upplagdar møguleikar, so lá tað í luftini, at teir kundu fáa mál. Eg haldi tað var eitt sindur bíligt, tá ið vit mistu ein mann, og tað gjørdi ikki støðna betri. Men soleiðis vísir tað seg ofta, at luturin hjá teimum veikaru er. At vit vóru noyddir at gera fleiri broytingar orsaka av skaðum sást aftur. So alt í alt eiga vit at vera nøgdir við, at vit hesa ferð fingu eitt stig, heldur TB veteranurin Trond Nolsøe.

Næsta ættarliðið hjá gomlu TB meistarunum er um at koma fyri seg. Hesa ferð var ein, sum eitur Niels Rødgaard settur á vøllin. Hann er sonur John Rødgaard, sum var sera stinnur á TB miðvøllinum í sjeyti árunum.

NSÍ-TB 1-1 (0-1):

# Tvørámenn høvdu stinnan skansa

**Royndu menninir í aftastu røðini stóðu stinnir, tá ið NSÍ alt seinna umfarið royndi at leggja trýst á, og ikki fyrrenn í evstu løtu eydnaðist tað NSÍ at tryggja sær eitt stig**

NSÍ-TB
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*TB var undir stórum trýsti at kalla allan seinna hálvleik, men kortini var um reppið, at teir fingu øll trý stigini*
*Mynd: Bárður Lydersen*

Tvørámenn fóru úr Runavíkini við einum stigi. Tað vóru teir bæði nøgdir við og ikki nøgdir við. Teir vóru nøgdir, tí vánirnar vóru einki serligar undan dystarbyrjan. Eitt var, at teir sum uppflytarar vórðu roknaðir sum kanónføði. Og meiri týdningarmikið og svárt fyri TB var tað, at teir undan dystinum vóru illa raktir av skaðum, og tað gjørdist ikki betri, sum tíðin gekk.

Í tveimum teimum fyrstu umførunum høvdu Hallur Christiansen og Emmanuel Larby verið teir fremstu. Larby var skaddur undan fráferðini av Tvøroyri. Hallur Christiansen var eisini skaddur, men hann royndi at hita upp, áðrenn tað varð staðfest, at tað ikki bar honum til at spæla. Tað vil við øðrum orðum siga, at Daniel Nyarko og Olivur Abrahamsen vóru nýggir álopsspælarar.

Á miðvøllinum var Alexander Jovevic, sum í fjør spældi við NSÍ, týdningarmikil í 1. hálvleiki. Hann megnaði at halda upp á bóltin, tá ið tað var neyðugt, og hann tordi at royna og harvið at risikera at gera mistøk. Tíðliga í 2. hálvleiki noyddist hann at taka seg aftur. Hóast nýggju menninir gjørdu sítt besta, so sigur tað seg sjálvt, at tað kostaði at missa lyklaspælaran á miðvøllinum.

Út frá lasarettstøðuni er tað einki at siga til, at teir í TB vóru nøgdir. At teir vóru eitt sindur misnøgdir komst av, at teir høvdu hildið tørn um 1-0 leiðslu, inntil tað bara var minni enn ein hálvur minuttir eftir av yvirtíðini. Tá javnaði Andy Olsen, eftir at horna var bent út frá til Christian Høgna Jacobsen, sum spældi til málskjúttan.

## Borgin

Tað er stór avbjóðing at vera lásasmiðjur á heimavølli ímóti verju, sum er so stinn og væl skipað, sum tann hjá TB var í 2. hálvleiki. Tað noyddust teir í NSÍ at staðfesta.

Undan steðginum vóru tvørámenn væl vil. Uppløgdu málmøguleikarnir vóru ikki so nógvir, men Christian Høgni Jacobsen var tætt við, tá ið hann beindi bóltinum í stólpan.

Eftir steðgin vóru teir fýra óføru í TB verjuni ofta í egnum brotsteigi, og miðvøllurin ofraði seg væl, tá ið NSÍ royndi við langskotum. At TB verjan stóð so aftarlaga bar við sær, at møguleikin at leggja inn um verjuna ikki var til staðar. Tí var ofta talan um skrásendingar í brotsteigin, og tað var matur fyri Óla Johannesen og Aca Petrovic.

Í 74. og 76. minutti fekk Predrag Zivkovic gult kort, og tá ið TB var undirmannað síðstu løtuna, gjørdist trýstið uppaftur størri.

Fimm minuttir vóru lagdir afturat, og klokkan vísti 94.40, tá ið Andy Olsen sendi bóltin í málið og harvið javnaði til 1-1.

Tað høvdu teir í Runavík neyvan verið nøgdir við undan dystarbyrjan. Men tá ið teir ikki megnaðu at spæla seg skjótt ígjøgnum tøttu verjuna, og tá tað harvið í 2. hálvleiki, tá ið tíðin bar uppaftur størri mótbrekku við sær, fyri tað mesta var talan um stórt trýst, men bara hálvar møguleikar og minni enn tað, so var tað kanska ikki so galið.

## FAKTA UM DYSTIN

**NSÍ-TB 1-1 (0-1)**
0-1: Óli Johannesen 6.
1-1: Andy Olsen 90.
**Dómari:** Eiler Rasmussen
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen - Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Viggo Johannesen, Einar Hansen - Andy Olsen, Dániel Hansen, Kári Hansen (Jústinus R. Hansen, 76.), Jónstein Petersen (Gert Langgaard, 68.), Christian Høgni Jacobsen, Ike Onyema
**Gult kort:** Jústinus R. Hansen
**TB:** Predrag Markovic - Predrag Zivkovic, Óli Johannesen, Aca Petrovic, Jon Johannesen - Allan Poulsen (Niels Rødgaard, 89.), Alexander Jovevic (Birgir Rasmussen, 50.), Einar Petersen, Búi Mortensen (Mortan Enni, 63.) - Daniel Nyarko, Olivur Abrahamsen
**Gult kort:** Predrag Markovic
**Reytt kort:** Predrag Zivkovic (2 gul) 76.

# Vit mugu taka tað her frá

**Pauli Jarnskor ásannar, at GÍ í løtuni er ikki topplið, men hann hevur álit á, at teir fara at arbeiða seg burtur úr tronganum, sum teir nú eru í**

GÍ
*Jóannes Hansen*

Trý umfør og einki stig. Støðan er ikki vanlig í Gøtu, og tað var neyvan undan kappingarbyrjan roknað við, at GÍ einki stig skuldi hava, tá ið trý umfør vóru runnin, men soleiðis er støðan.

Sjálvandi ber hetta trýst við sær, men í Gøtu hava teir ikki mist mótið:

- Vit hava ikki megnað uppgávurnar, sum á pappírinum kanska hava sæð lættari út. Nú standa torførar uppgávur fyri framman. Vit plaga at standa okkum væl í Vági. Takið verður at fokusera upp á tað avbjóðingina í staðin fyri at hava tapini í trimum teimum fyrstu umførunum í viðføringum suður, sigur Pauli Jarnskor, hjálparvenjarin hjá GÍ, sum dómarin var so rísin inn á, at hann vísti honum út um girðingina. Av órøttum heldur Pauli sjálvur.

*Plágar tað tykkum ikki, at tit einki hava fingið burturúr?*

- Sjálvandi vita vit, at tað er neyðugt at venda gongdini, og tað hevði havt verið hugaligari, um vit høvdu havt fleiri stig, men vit mugu taka tað herfrá. Vit arbeiða framvegis við at spæla nýtt lið saman, og vit hava ikki hildið okkum hava tilfar til toppplasering, men vit halda okkum hava neyðuga førleikan til bestu deildina. Einki kemur av sær sjálvum. Tað skal arbeiðast fyri tí, og eg halda, at bæði liðini royndu at spæla fótbólt, hóast umstøðurnar vóru út av lagi vánaligar, staðfestir GÍ hjálparvenjarin.

# Hetta var ikki nóg gott

**Christian Høgni Jacobsen ásannar, at tað var sera torført hjá teimum, tá ið TB verjan lá so aftarlaga og var bæði tøtt og stór**

NSÍ
*Jóannes Hansen*

Christian Høgni Jacobsen var um reppið at javna til 1-1 í 1. hálvleiki, men bólturin endaði á stólpanum. Fram ímóti dystarenda átti hann næstsíðsta fótin á, tá ið Andy Olsen javnaði og harvið syrgdi fyri, at eitt stig var í Runavík.

- Hatta var ikki nóg gott. Vit fingu eitt mál ímóti okkum beinanvegin, og talan var um púra óneyðugt mál. Talan var um afturlegging til Jens Martin, sum fór so mikið skeiv, at bólturin fór út til horna. At teir skoraðu skakaði okkum heilt týðuliga, og tá ið vit ikki megnaðu at gera mál í 1. hálvleiki bar tað við sær, at tíðin kendist ganga eyka skjótt eftir steðgin, heldur Christian Høgni Jacobsen.

*Tit kunnu ikki vera nøgdir við eitt stig á heimavølli ímóti uppflytarunum?*

- Um vit skulu vera við í toppinum, so krevst tað, at vit vinna á heimavølli, men tað evnaðu vit ikki hesa ferð. Vit megnaðu ikki at taða verjuna sundur. Teir lógu aftarlaga, og Óli og hin stóri maðurin í miðverjuni dugdu væl at stýra. Um vit høvdu havt skorað fyrst og kanska tíðliga, so hevði talan ivaleyst verið um heilt øðrvísi gongd. Men tað gjørdu vit ikki, og so gekk tað fyri seg eftir teirra treytum, staðfestir Christian Høgni Jacobsen.